# Neyðugt við greiðum boðum

**Støðan er átrokandi og tað er neyðugt, at Landsstýrið gevur Løgtinginum greið boð um, hvussu trupulleikarnir hjá studentaskúlanum, tekniska skúla og handilsskúlanum verða loystur, sigur Jenis av Rana**

SKÚLABYGGING
*Áki Bertholdsen*



*Óvissan ger, at studentaskúlin hevur mangla pening til viðlíkahald, og skilið er hareftir, sigur Jenis av Rana*

Jenis av Rana, løgtingsmaður, vil nú hava at vita, hvussu gongst við ætlanini at loysa heilistrupulleikarnar hjá studentaskúlanum, handilsskúlan um og tekniska skúla.

Í dag fer hann at seta landsstýrismanninum í skúlamálum, Annlis Bjarkhamar, ein skrivligan fyrispurning á Løgtingi um hesar tríggjar skúlarnar.

Jenis av Rana vil hava at vita, hvussu gongst við út- og nýbygging av hesum skúlum, nær byrjað verður, hvar byggjast skal og í hvørjari raðfylgju, skúlarnir verða bygdir.

Hann minnir á, at í 1996, var arkitektakapping um at byggja nýggjan studentaskúla í Hoydølum. Men projektið, sum vann, var tó seinni slept, tí ætlanin var í staðin at byggja skúladepli úti við Marknagilsvegin við bæði studenta-handils og tekniska skúla.

– Grundgevingarnar fyri ikki at byggja í Hoydølum vóru m.a. at ein nýggjur skúli bleiv ov dýrur, og at grundin, sum skúlin í síni tíð bleiv bygdur á, varð mett at vera ov veikt.

Seinni eru tó ivi settur við bæði hesi sjónarmið.

Jenis av Rana sigur, at í januar í 2001, legði hann, saman við Jákupi Sverra Kass og Kristiani Magnussen uppskot fyri ting um at byggja skúlan í Hoydølum út og um.

Teir tríggir løgtingsmenninir mettu, at tað verður seinur dagur, at depilin við Marknagilsvegin verður bygdur og meðan bíðað verður, verða neyvan tær stóru játtaninar lætnar til at røkja bygningarnar.

Uppskotið varð tó ikki samtykt við tað, at 11 atkvøddu fyri, ein atkvøddi blankt og 16 ímóti.

Jenis av Rana sigur, at tó at samgonguskjalið ger greitt, at farast skal undir at byggja depilin verður tó einki sagt um nær.

– Óvissan um framtíðarstøðuna hjá skúlunum stendur tí við og óvissan hevur ført við sær, at serliga studentaskúlin hevur manglað fígging til viðlíkahald og skilið er hareftir.

– At Tekniski skúlin eisini er komin í rættiligt rasshaft, ger tað uppaftur meira átrokandi við einari greiðari fráboðan frá landsstýrinum, sigur Jenis av Rana.

– Alt gott annars at siga um Skúladepilin í Marknagili, sum verður mettur at verða ein varandi loysn, sum loysir ein skúlatørvin í langa tíð frameftir.

– Men mong eru, sum avgjørd mæla frá hesi ætlan og heldur mæla til at fara aftur til upprunaætlanina í Hoydølum og so at byggja handilsskúla og tekniska skúla í Marknagili, sigur Jenis av Rana.

# Tekur striptease upp í Løgtinginum

**Jenis av Rana vil hava at vita, um tað er lógligt at skipa fyri striptease í Føroyum**

STREAPTEASE
*Áki Bertholdsen*

Er tað loyvt at skipa fyri striptease í Føroyum.

Hetta er ein spurningur, sum Jenis av Rana, løgtingsmaður fyri miðflokkin, nú fer at reisa á Føroya Løgtingi.

Í dag fer hann at seta ovasta, politiska myndugleika á økinum í Føroyum, Landsstýrismanninum í lógarmálum, Høgna Hoydal, ein skrivligan fyrispurning um striptease í Føroyum

Jenis Av Rana vil hava at vita, hvørjar lógir eru galdandi í Føroyum viðvíkja striptease, skøkjulevnaði, handli við kvinnum og tí at breiða út pornografisk rit.

Hann vil eisini hava av vita, hvør hevur evstu ábyrgdina á økinum og sostatt ábyrgdina av slíkum virksemi og hvør í sostatt eisini hevur møguleika fyri, at forða tílíkum virksemi.

Somuleiðis spyr Jenis av Rana, um tað var lógligt, sum stóð í lýsingablaðnum, íð Havnar Bóltfelag sendi í hvørt hús í høvuðsstaðarøkinum á Ólavssøku.

Tað, løgtingsmaðurin sipar til, er, at í blaðnum var stór lýsing frá Club 20, har boðið varð til striptease á Ólavssøku – og at byrjað var sunnukvøld kl. 22.00.

– Umframt at vísa pornografiskar myndir, stóð eisini internet addressa hjá skøkjustaði í Keypmannahavn í lýsingini, sigur Jenis av Rana.

At enda spyr Jenis av Rana, um landsstýrismaðurin fer at seta neyðug tiltøk í verk, íð kunnu forða fyri striptease, handli við kvinnum og skøkjulevnaði í Føroyum?

**Minst fýra milliónir um árið**

Í sambandi við Fyrispurningin sigur Jenis av Rana, at S.T metir, at hvørt ár verða minst fýra milliónir fólk, flest teirra kvinnur og børn, seld millum heimsins lond í sambandi við skøkjulevna. Hjá skøkjum er miðalaldurin 13 ár, tá tø tær byrja.

Í Svøríki er skøkjulevnaður mettur sum harðskapur ímóti kvinnum og er bannaður við lóg.

Jenis av Rana vísir á, at bæði í Danmark og Íslandi, hevur skøkjulevnaður vundið nógv upp á seg seinastu árini og í báðum hesum londum verður staðfest, at tað byrjaði við at loyva striptease.

Hann vísti eisini á, at ein fyrilestrarhaldari í Norðurlandahúsinum á fundinum hjá Kvinnufelagnum og Kreppumiðstøðini um skøkjulevnað, herfyri, vísti á hetta sama og ráddi føroyingum til at steðga hesum.

Jenis av Rana sigur, at ein av fyrilestrarhaldarunum endaði sína framløgu á hesum fundinum við at siga, at enn er ikki ov seint hjá føroyingum at taka støðu í hesum máli.

# Suðurrás fær stuðul frá Hvalbiar Kommunu

**Hósdagin 3. oktober fer Suðurrás í luftina fyrstu ferð**

LOKALVARP
*Áki Bertholdsen*



*Nýggja útvarpsstøðin hjá suðuroyingum, Suðurrás, heldur til í hølum hjá Litbúðini í Vági. Hósdagin 3. oktober kl. 17. fer hon at senda fyrstu ferð*

Hvalbiar Kommuna hevur nú eisini játtað at stuðla nýggju útvarpsstøðini Suðurrás.

Suðurrás er eitt lokalvarp fyri Suðuroynna og Hvalbiar Kommuna samtykti á fundi hóskvøldið at stuðla tiltakinum við 10.000 krónur.

Tað er nú eisini greitt, at hósdagurin 3. oktober verður dagurin, tá ið Suðurrás fer í luftina fyrstu ferð.

Í fyrstu syftu fer lokalvarpið hjá suðuroyingum at gera sendingar, sum Útvarp Føroya síðani keypir og sendir, júst sum lokalvarpið hjá norðoyingum, Studio Pegesus, nú ger.

Avtalað er gjørt við Útvarpið um at Suðurrás skal gera eina sending uppá ein tíma um vikuna, sum síðani verður send í útvarpi Føroya hvønn hósdag ímillum klokkan 17 og 18, so leingi vetrarskráin hjá Útvarpinum er.

Ein sending við tilfarið úr Suðuroynni verður sostatt fastur táttur í Útvarpi Føroya hvønn hósdag seinnapartin til einaferð í mai mánað.

Annars er ætlanin, sum fráliður, at Suðurrás skal keypa sín egna sendara og senda sjálvt til alla oynna ein stóran part av degnum.

Bjarni Johansen, ein av stigtakarunum til hesa nýggju útvarpsrásina, sigur, at ætlanin er, at Suðurrás skal hoyrast í øllum bygdum í Suðuroynni og ætlanin er eisini at hava tilfar úr øllum bygdum, úr Sumba, heilt til Sandvíkar.

Talan kann verða um samrøður við suðuroyingar, frágreiðingar um hendingar og tilburðir í oynni og annað.

Nær Suðurrás fær sín egna sendara, er tó ikki greitt enn.



# Tey duga væl at goyma, at tey gloyma

**Mett verður, at umleið 900 fólk í Føroyum hava Alzheimersjúkuna, ein deyðilig sjúka, sum rakar minnið og sum frálíður eisini persónligheitina. - Tann, tú ert góður við, broytist og glíður so líðandi frá tær, tú røkkur hann ikki. Tey fyrstu árini sær hann ikki sjúkur úr, og í stuttum samrøðum dugir hann at snúgva sær, so fremmant fólk ikki varnast, at nakað er galið. Tað segði Sigrún Mohr, forkvinna í Alzheimerfelagnum, millum annað á pallborðsfundi í samband við Altjóða Alzheimerdagin leygardagin.**

ALZHEIMER
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Leygardagin 21.september varð Altjóða Alzheimerdagurin hildin kring allan heim. Í Føroyum varð dagurin hildin við pallborðsfundi í Studentaskúlanum í Hoydølum, sum Alzheimerfelagið skipaði fyri.

- Okkara fremsta uppgáva er at upplýsa um Alzheimersjúkuna, bæði fyri myndugleikunum, og fyri avvarandi hjá teimum, sum hava sjúkuna, greiðir Sigrún Mohr, forkvinna í Alzheimerfelagnum frá. Felagið, sum er eitt felag fyri avvarandi hjá fólki við hesi sjúku, varð stovnað 9.september í fjør, og hevur sostætt bara eitt ár á baki. Felagið hevur í dag 200 limir.

Sigrún Mohr metir, at Alzheimersjúkan er ein stórur trupulleiki í samfelagnum, tí her er talan um fólk, sum hava ein serligan tørv á hjálp.

- Fólk við Alzheimersjúkuni hava lætt við at gloyma, og sum frálíður broytist eisini persónligheitin, summi gerast kanska aggressiv, greiðir hon frá. Ofta kann vera trupult at fáa staðfest sjúkuna, og fólk kunnu ganga í fleiri ár við sjúkuni, uttan at hon verður staðfest. Eyðkent fyri fólk við Alzheimersjúkuni er, at tey duga væl at goyma, at tey byrja at gloyma, og eisini eru sjúkueyðkennini ofta rættuliga meinlík øðrum sjúkum

Alzheimersjúkan rakar sum oftast fólk yvir 60 ára aldur, men dømi eru eisini um, at fólk um 40-45 ára aldur verða rakt av sjúkuni. Kring allan heim eru umleið 18 milliónir fólk, sum hava Alzheimersjúkuna. Í Føroyum finnast eingi almen tøl yvir, hvussu nógv fólk hava hesa sjúku, men Sigrún Mohr metir, at talan er um umleið 900 fólk. Talið kemur hon fram til við at hyggja at, hvussu nógv fólk hava sjúkuna í okkara grannalondum og samanbera við føroysk viðurskifti.



*Sigrún Mohr, forkvinna í Alzheimerfelagnum, tosaði um støðuna hjá teimum avvarandi at alzheimersjúklingum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Ringt at vera avvarðandi**

Á pallborðsfundinum leygardagin greiddi Sigrún Mohr, sum sjálv hevur eina mammu við Alzheimersjúkuni, frá, hvussu tað er at vera avvarandi hjá einum fólki við Alzheimersjúkuni. Fyri tveimum árum síðan fekk mamma teirra staðfest sjúkuna. Sigrún greiðir frá, at sjúkan tá var púra ókend fyri teimum, tey vóru tveitt inn í ein nýggjan heim, har alt var ókent og fremmant. Eftir at hava lisið um sjúkuna, gekk upp fyri teimum, hvat lá fyri framman, bæði hjá mammuni og hjá teimum sjálvum.

- Tað er ómetaliga svárt at varða av einum persóni við Alzheimersjúkuni. Tann, tú ert góður við, broytist og glíður so líðandi frá tær, tú røkkur hann ikki. Sjúklingurin sær ikki sjúkur út, í hvussu so er ikki tey fyrstu árini, og í stuttum samrøðum dugir hann væl at snúgva sær soleiðis, at fremmant fólk varnast ikki, at nakað er galið. Tí fara nógvir tankar gjøgnum høvdið, millum annað, um onnur halda, at vit gera mammu okkara sjúka, ella um diagnosan er røtt.

Sigrún Mohr greiðir frá, at tað tíðum gevur ringa samvitsku at vera avvarðandi. Tú fært ringa samvitsku, tí tú átti at verið meira hjá mammu tíni, tú átti at gjørt meira saman við henni, og tú átti at givið pápa tínum meira frí, so hann ikki bukkar undir. Eisini fært tú ringa samvitsku av mótsigandi kenslum, tí persónurin er so nógv broyttur, at nógv av tí, hann ger, passar ikki til tann persónin, sum hann var áðrenn sjúkuna. Og tú fært ringa samvitsku, tá tú gert av, at mamman skal til umlætting, hóast tú veitst, at hon kennir seg tryggari heima í kendum umhvørvi.

**Ov fá tilboð**

Forkvinnan í Alzheimerfelagnum metir, at tað í dag eru alt ov fá tilboð til fólk við Alzheimer- og øðrum demenssjúkum. Hon vísir á, at hesi fólk hava ein serligan tørv, og hava sum heild tørv á nøgvari, serkønari hjálp. Sum er hava Lágargarður í Havn og ellisheimið í Vágum serstakar deildir til fólk við demenssjúkum. Harumframt er ætlanin, at partar av Tjarnargarði, sum er gamla Marinustøðin, skal vera dagtilhald fyri minnisveik, umframt at farið er í holt við at byggja eitt nýtt heim fyri minnisveik í Vallalíð í Havn. Sigrún Mohr fegnast um, at nakað verður gjørt fyri fólk við demens, men hon metir, at framvegis liggur nógv á láni. Sum áður nevnt verður mett, at umleið 900 fólk í Føroyum hava alzheimersjúkuna, og tí er talan um ein stóran trupulleika.

- Tað er av alstórum týdningi, at vit eru varug við tørvin hjá hesum fólkum. Tað er ikki nóg mikið at byggja vanlig røktarheimspláss til hesi fólkini, eisini er neyðugt alla tíðina at kunna starvsfólkini í heilsuverkinum, avvarandi og onnur um sjúkuna, og hvønn tørv hesi fólkini hava, greiðir Sigrún Mohr frá. Alzheimerfelagið skipaði í vár fyri skeiði fyri avvarandi, um hvussu vit eru saman við teimum dementu. Eisini eru bólkar skipaðir fyri avvarandi, bæði í Havn og í Klaksvík, umframt at ein Demenslinja er sett á stovn, har fólk tveir tímar um vikuna kunnu ringja inn við spurningum um sjúkuna.

**Positiva byrjan**

Nú Alzheimerfelagið hevur eitt ár á baki, metir Sigrún Mohr, at undirtøkan fyri felagnum hevur verið sera góð, og felagið hevur fingið eina positiva byrjan. Umleið 80 fólk vitjaðu pallborðsfundin í samband við Altjóða Alzheimerdagin leygardagin, har eisini fleiri fyrilestrar vóru á skránni. Sofus Joensen, serlækni í psykiatri helt fyrilestur um demens, Marjun Sigurðsdóttir, forkvinna í MBF tosaði umm hvørji almenn hjálpartilbøð eru til taks í dag, og Jákup Foldbo stjóri fyri heimarøktina og serforsorgina, greiddi frá um tey demenssjúku sum brúkarabólk nú og í framtíðini. Sjálv greiddi Sigrún Mohr frá um støðuna hjá teimum avvarandi at alzheimersjúklingum. Anfinn Kallsberg, løgmaður, er verji fyri Altjóða Alzheimerdagin, og tað var eisini hann, sum setti fundin leygardagin.

Í ár var tað 9.ferð, at Altjóða Alzheimerdagur varð hildin kring heim. Hetta var fyrstu ferð, at dagurin varð hildin í Føroyum, men Sigrún Mohr sigur, at ætlanin er at dagurin 21.september á hvørjum ári skal markerast við onkrum tiltaki.



*Umleið 80 fólk tóku lut á pallborðsfundinum í samband við Altjóða Alzheimerdagin leygardagin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*